# Stjørnan kann skapa spenningin

**Vinnur Stjørnan oddadystin móti VÍF sunnudagin, kemur spenningur av álvara í aftur landskappingina hjá kvinnum**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Eingin sum helst ivi er um, hvør stórdysturin hetta vikuskiftið verður. VÍF fer á vitjan í Klaksvík, og helst kann longu nú staðfestast, at størri uppgávu enn tað sama fáa meistararnir ikki í føroysku kappingini.

### Nógv gott í væntu

Her er ikki bert talan um dyst millum meistararnar tey bæði seinastu árini. Hetta er dysturin millum tey bæði liðini, sum hava staðið seg nógv best í ár. Millum toppskjúttan trý tey seinastu árini móti leikaranum, sum hóttir við at taka hendan heiðurin í ár. Millum tvær stinnastu málverjarnir í kvinnudeildini og soleiðis kundi ein hildið áfram.

Kanska hava avrikini hjá báðum liðum ikki verið so øgiliga sannførandi seinastu tíðina, men hetta botnar helst eisini í, at tey sjáldan hava fyri neyðini at spíla seg út. Munurin niður til hini liðini hevur snøgt sagt verið alt ov stórur, til at nøkur verulig hóttan hevur verið í hesum, og eitt nú hevur tað verið týðiligt hjá VÍF, at tær hava spart stuðulsleikarar seinastu dystirnar, soleiðis at tær við vissu eru 100% klárar til dystin.

Annars kann til stuttleikar nevnast, at tað er í júst hesum dystinum, at oddaliðið hevur havt trupulleikar seinnu árini. Í fyrraárið vann VÍF púrasta í Klaksvík, eftir at Stjørnan hevði sópað alla aðra mótstøðu til viks, og í fjør var júst hesin dysturin tann einasti, har VÍF ikki fekk fulla úrtøku.

Sjálvandi kunnu hagtølini ikki nýtast til so øgiliga nógv, men hinvegin er lítið at ivast í, at áskoðararnir fáa ein spennandi dyst. Ein ferðmiklan dyst, har leikararnir fara at geva seg fult út og kanska nakað afturat.

Roknað verður við tí heilt stóra, og tað er so púrasta víst, at tað verður ein stúgvandi full KÍ-høll, sum fer at leggja gólv til dystin.


*VÍF vann dystin í Vestmanna móti Stjørnuni við trimum málum. Nú hevur Stjørnan møguleika at hevna seg og samstundis skapa veruligan spenning í oddastríðnum*

### Botnliðini kunnu bíta

Sæð í mun til stórdystin, so mest sum følna vónirnar til hinar dystirnar, men fyri tað er ikki vist, at talan als ikki verður um spenning.

Ikki minst kann tað gerast spennandi í Havn, tá VB kemur á vitjan hjá Kyndli. Kyndil hevur higar til í ár havt sera vánalig úrslit, men tað merkir avgjørt ikki, at avrikini alla tíðina hava verið eins vánalig. Størsti trupulleikin tykist vera, at tær hava valt at nýtt teir góðu dystirnar, tá mótstøðuliðini hava verið sterk, meðan snøgt sagt einki hevur borið til, tá spælt hevur verið móti hinum botnliðunum.

Nú kemur VB, sum ivaleyst hoyrir til sterkaru liðini í deildini, á vitjan, og so er spurningurin, hvussu verður við Kyndli hesaferð. Spæla tær, sum tær gjørdu móti VÍF seinast, kann væl verða, at VB fær ein sera truplan dyst, men er lagið á kyndils-liðnum hinvegin ringt, fer VB uttan iva at leggja enn størri sjógv niður til tey trý niðastu.

Seinastur av teimum trimum dystunum er tann í Havn sunnudagin, har Sóljan kemur á vitjan hjá Neistanum. Her er neyvan nakar ivi um, at tað er Neistin, sum er favorittur, um metast skal eftir stigatalvuni. Hinvegin hava avrikini hjá Neistanum als ikki verið sannførandi, tá tær í seinastuni hava vunnið á StÍF og Kyndli. Í báðum førum var talan um sera teprar sigrar, og megna tær ikki at lyfta seg sjálvar, kunnu vágakvinnurnar væl verða tær, sum skapa fyrstu veruliga sensatiónina í kvinnudeildini í ár.

# Eingir lættir dystir

**Tríggir dystir verða í mansdeildini um vikuskiftið, og felags fyri allar er, at talan kann gerast um tann heilt stóra spenningin**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Í Havn hittast tey bæði botnliðini, Kyndil og KÍF, og hetta líkist dystinum um, hvør skal sleppa undan niðasta plássinum í jólasteðginum.

Kyndil hevur sum kunnugt havt lakasta árið í søgu felagsins higartil, og tað er helst hetta, sum leikaranrir vilja royna at bøta um, tá farið verður á vøllin móti kollfirðingum. Seinastu dystirnar hevur tó ein ávís framgongd verið at hóma á kyndilsliðnum, har styrkurin við Bárði Johannesen og Allani Mørkøre hevur verið sjónligur. Tí er tað helst ein stórur missur, at Bárður vegna leikbann ikki fær verið við hesaferð.

Hjá KÍF tykist pílurin eisini peika uppeftir í løtuni. Ikki minst mundi tað koma væl við, at teir vunnuleimadystin móti StÍF seinasta leygardag. Tað hevur annars fleiri ferðir verið heilt nær við hjá kollfirðingum, men mest sum hvørja ferð hava teir verið ov stuttir í avgerandi løtunum. Hesa ferð møta teir so einum liði, sum partvíst hevur havt sama trupulleika, og so er spurningurin, hvør parturin dugir best at takla trýstið, sum stendst av hesum.

Sunnudagin verða tveir dystir, og í báðum førum eru tað tey bæði oddaliðini, sum skulu royna at vinna stig.


*Vestmenningar fáa ivaleyst eina trupla uppgávu í Runavík, har heimaliðið hevur verið í støðugari framgongd, síðani kappingin byrjaði*

Í Runavík hevur VÍF uttan iva eina trupla uppgávu, tá teir vitja Tjaldur. Runavíkingarnir hava havt góð úrslit seinastu tíðina, og mest av øllum vilja teir helst prógva, at teir kunnu standa seg í oddinum, og at stórtapið fyri Neistanum bara var ein kollektivur off-day.

Í Havn skulu Neistin og H71 takast. Undan kappingini varð nógv tosað um, hvussu langt hesi bæði høvuðsstaðarliðini mundu fara at røkka, men higartil hevur so eingin ivi verið um, at tað eru teir bláu, sum eru væl stinnari.

Tað er tó júst hetta, sum hoyvíkingar helst vilja broyta, tá teir fara á vøllin. Aloftast hevur H71 verið mett sum hitt lítla felagið í Havnini, og tí ræður tað hvørja ferð í slíkum dystum um at prógva, at teir nú hava vaksið seg enn eitt petti størri í mun til stórabeiggjan.



# Om en primadonna, en komponist, og om å bli gammel



Jeg ser henne bare i et glimt. Den eldre kvinnen som går forbi mitt vindu. En stor kvinne. En slitt, oppgitt holdning. Hun minner meg om noen. Hvem?

Plutselig husker jeg henne. Henter henne frem i erindringen.

Det er noen år etter krigens slutt. Hun sitter i en dyp komfortabel sofa i en hotellsalong i Stavanger. I rutemønstret ullkåpe i gult og brunt. Hun svøper kåpen tett om seg, som om hun fryser.

Jeg betrakter henne. Det dratte ansiktet. Det glansløse rødbrune hår. Den sammensunkne skikkelsen. Så skuffende annerledes enn bildene av henne. Scenens og filmens vakre, lysende stjerne. Europas ubestridte primadonna. Fetert og omsvermet.

Die Sara.

Sara Leander.

Jeg finner intet spor av henne.

Om knappe to timer skal hun stå på scenen. Møte det store, forventningsfulle publikum. Er det dette de vil få se og høre?

En trett gammel dame. En fortid.

Hun sier.

– På scenen lever jeg. Der er jeg uten alder.

Hun forteller. Om en ung svensk pike som erobret verden. Om suksessenes endeløse rekke. Om krigens år i Tyskland. Om nazikoryfeene. Hitlers, Gørings og Goebels grenseløse beundring (hører jeg et snev av forakt i hennes stemme da hun omtaler dem?)

Hun beretter om årene etter krigen. Om hatske utfall fra landsmenn og andre. Stemplet som medløper og nazist. Om utfrysning og boycott. Om oppreisning og nye triumfer...

– Jeg har erfart alt. Gleder og sorger. Seire og nederlag. Jeg har stått på den høyeste tinde, og er dratt ned i de dypeste daler.

Hun smiler ...

– Kom til min forestilling. Da er jeg igjen på den høyeste tinde.

Jeg sitter i teatersalen. Jeg opplever underet. Hun står der. I lyssirkelen fra en kraftig spotlight. Primadonnaen. Die Sara. Høyreist. Flott. Vakker. I beregnet kontrast til det flammende røde hår er en fotsid hvit pelskåpe drapert over hennes nakne skuldre. Paljettkjolen glitrer i sølv og gull.

Hennes utstråling er magisk. Med sitt blotte nærvær favner hun inn scene og publikum.

Det går et sus gjennom salen da hun begynner å synge. Den er der ennu. Den dype, sløret sensuelle røst som ingen har maken til.

»Vill ni se en stjärne. Se på mig«.

I sang etter sang trollbinder hun oss.

Den største. Den eneste. Den siste Diva.

Hun går frem til rampen. Hun synger til de mange unge på de bakerste benkerader. En sang om å eldes. Bli gammel. Om at ethvert menneske i alle sine aldre oppnår sine lykkelige øyeblikk. Som hun. Her. Nu.

»Jag är så glad att jeg inte längre är ung«.

Tankene sviver videre i fortiden. Til det ene og det annet menneske jeg har møtt og kjent. Som den lille, spinkle mann i huset ytterst i havgapet i det vestlige Norge. En sky selvutslettende mann. Omgitt av sine roser, sine kaktuser og sin Bach. Få kjenner som ham livets dype daler. I årtier hånet, utskjelt og latterliggjort. Hans komposisjoner møtte raseri, motstand og drepeliggjørende kritikk. Ingen ville spille hans musik. Ingen ville høre den.

Nu har han seiret. Verdens fremste orkestre og solister oppfører hans verk. Kritikerne hyller ham som en av musikkens store nyskapere. En gigant.

Hans navn. Fartein Valen.

Jeg spør ham.

– Hva tenker du i dag om alle de som med harde og grusomme ord avviste din musikk?

Han sier lavt. Med uslukkelig indre styrke.

– Det samme som alltid før. Jeg ber frelserens bønn. »Tilgi dem fader, for de vet ikke hva de gjør.«

Sara Leander. Fartein Valen. Den første søkte rampelyset og publikumsbruset. Den annen ensomheten og stillheten. Begge opplevet i sine alderdoms år noen av livets lykkestunder.

Å bli gammel er ikke en tragedie. Det betyr nye muligheter. Nye seire. Nye lykkelige tider.

I mitt indre øre hører jeg Sara synge. Ennu en gang.

»Jeg är så glad att jeg inte längre är ung«.

# Jólakonsertin hjá felagskórinum Gøta/Leirvík

JÓLAKONSERT
*Tíðindaskriv*

Jólakonsert við Felagskórinum Gøta/Leirvík verður í Gøtu Kirkju sunnudagin kl. 16 og í Missiónshúsinum í Leirvík sunnudagin kl. 18. Solistur hjá Felagskórinum er Eivør Pálsdóttir. Við á konsertini verða eisini Leirvíkar Gentukór, skúlabarnakór úr Leirvík og barnakór úr Gøtu. Harafturat fara tríggir evnaríkir ungir dreingir, Eilif, Ári og Bogi at spæla tvey instrumental løg.

Felagskórið Gøta/Leirvík fer aftur í ár eins og undanfarin ár at halda tvær jólakonsertir, eina í Gøtu og eina í Leirvík. Tann fyrra konsertin verður í Gøtu Kirkju sunnudagin kl. 16, meðan tann seinna konsertin verður kl. 18.00 í Missiónshúsinum í Leirvík.

Í Felagskórinum Gøta/Leirvík eru umleið 30 sangarar, sum undir leiðslu av Heðini Kambsdal fara at syngja, fyrst og fremst jólasangir, bæði traditionellar, men eisini onkrar nýggjari jólasangir. M.a. “When You Wish up on a Star”, ið er best kendur frá teknifilmunum, ið verða vístir jólaaftan. Soloina í “When You Wish up on a Star” syngur Eivør Pálsdóttir. Harafturat syngur Eivør eisini solo í “Halgu nátt”. Felagskórið Gøta/Leirvík fer eisini at syngja “Trælakórið” av Verdi”. Trælakórið verður hesuferð sungin á Føroyskum.

Leirvíkar Gentukór og børn úr Leirvík fara at syngja nøkur løg, undir leiðslu av Dánial Eysturstein. Harafturat fer barnakór úr Gøtu Tónlistaskúla, ið var settur á stovn aftur í heyst, at syngja tvey løg. Kórleiðari har er Magnus Jacobsen.

Sum nakað ørðvísi fara tríggir ungir, evnaríkir dreingir, Eilif, Ári og Bogi at spæla tvey instrumental løg, á klaver saxofon og trompet. Annað av løgunum hava teir smíðað sjálvir.

Konsertin endar við, at Felagskórið, Gentukórið og børnini at syngja saman.

Konsertin minnir mest um eina sangguðstænastu, við inn- og útgangsbøn, felagssangi og smáum lestrum inn ímillum. Upplesari verður Julia Lamhauge.

Við ynskjum um eini góð og hugnalig jól, bjóðar Felagkórið øllum at verða vælkomnum á konsert sunnukvøldið kl. 16 í Gøtu Kirkju og kl. 18.00 í Missiónshúsinum í Leirvík.

## VIÐMERKINGAR

# Sjúkueyðkenni

**Sunleif Rasmussen**



Í síðstu viku sendi javnaðarflokkurin loksins vatnberara í aftastu røð at svara Hera Eysturlíð aftur.

Hetta var á mangan hátt ein merkisverd grein. Her kom m. a. fram at tónleikarar skulu spæla tónleik, og ikki fáast við at skriva um politisk viðurskifti. So vita vit tað. Vóni um ikki annað at hetta uppskotið um, at skerja skrivifrælsi hjá ávísum samfelagsbólki, er eitt eindømi í Javnaðarflokkinum.

Greinskrivarin sigur eisini, at grundin til at eingin hevur svarað Hera aftur er, at ein ikki sparkar liggjandi mann. Til tað er at siga at maður, ið gevur pláss fyri innleggum á heimasíðu Javnaðarfloksins, har politiskir mótstøðumenn verða samanlíknaðir við størstu bølmenni í heimssøguni, ikki bert ríður lágt moralskt, men liggur skerflatur.

Heri hevur í fleiri førum viðgjørt retorisku armóð formann Javnaðarfloksins, tá ið hesin samanber eina politiska semju í Føroyum við krystallnáttina. Náttina, har størsta hópdráp í Evropeisku søguni byrjaði. Tann einasti trupulleikin hjá Hera er, at hann tey seinastu nógvu árini hevur búð í Svøríki, har man hevur eina meira siviliseraða politiska mentan enn her á landið, og har politiska lívið hjá floksformanni, við so út av lagið vánaligum retoriskum gávum, hevði fingið ein bráan enda.

Tað mest merkisverda í hesi grein, er at greinskrivarin spyr um nakar kann hjálpa Hera Eysturlíð, tí maðurin er sjúkur. Nú er hetta ikki so groft sum at samanlíkna politiskar mótstøðumenn og teirra avrik, við Hitler og hansara gerðir, men argumentið og hátturin eitt mál verður viðgjørt uppá, vísir manglandi skygni og minnir óhugnaliga nógv um fátøku retorisku gávurnar, ið valda í ovastu leiðslu Javnaðarfloksins.

Eftir mínum tykki er maður, ið átalar so sjúkueyðkenda politiska mentan, sum her er talan um, spilfrískur.





SUÐRINGAR
Vit hava opna nýggja hár- og húðrøktanarstovu í Vági.

Vit kunnu bjóða tykkum:
- Alt innan hárviðgerð
- Alt innan húðrøkt
- Hártøka, t.d. við epilering ella voks
- Søla av smyrsli, krem, shampoo v.m.
- Vøkur gávukort, ið kunna nýtast til viðgerðir ella vøru

petur & petur • 320870